DAGSINS MEINING

Vikuskiftissosialur og nýtt debatforum

Sum lesarin longu hevur lagt til merkis hava vit í dag broytt høvdið á forsíðu blaðsins. Hereftir fer blaðið, sum kemur út fríggjakvøld at eita "VIKUSKIFTISSOSIALURIN". Hetta verður gjørt í ásannini av, at føroyingar hava brúk fyri einum veruligum vikuskiftisblaði, tvs. fjølbroyttur og rúgvusmikil lesnaður til alt vikuskiftið. Aðrastaðni hava tey sunnudagsblað, sum nøkta henda tørv, men vitandi, at tað er ein sera kostnaðarmikil og møtimikil uppgáva at geva blað út her á landi sunnudag, hava vit so valt alternativið at menna blaðið, sum kemur út leygardag, við fleiri samrøðum, portrettum, hugleiðingum, frásøgnum ol. Hetta verður ment sohvørt.

Vit fara so eisini at gera meira við orðaskiftið. Sosialurin hevur seinastu mongu árini roynt at verið eitt gott og álítandi tíðindablað fyri allar føroyingar. Fólk kenna tíðindablaðið Sosialin sum eitt hitt fremsta blaðið innan tíðindi, ítrótt, og frásagnir um lívið í Føroyum ol.

Orðaskifti hevur eisini verið í Sosialinum, men fyri tað mesta hevur hetta verið lesarabrøv ella onnur innlegg frá fólki, sum eru partur í onkrum stríði ella máli. Nøkur ár herfyri framdu vit ta broyting, at øll skulu skriva við fullum navi á kjaksíðunum. Nú vilja vit eitt stig viðari.

Viðhvørt hevur tað eydnast okkum at fáa fólk við vitan og royndum at leggja upp til meiri alment og mennandi kjak. Til dømis hava vit havt kronikkir, klummur og viðhvørt greinir undir heitinum Tinghelluni. Harumframt hava oddagreinir okkara eins og aðrar greinir roynt at ment føroyska kjakið.

Men nú hava vit lagt ætlan um betri skipað kjak í blaðnum. Sosialurin vil bjóða seg fram sum sterkasta og mest seriøsa debattforum í Føroyum við miðvíst at skipa eina sektión við kjaki og kønum greiningum hvørt vikuskifti. (Lesið meira á síðu 11 í Vikuskiftinum).

Debattin í Vikuskiftissosialinum verður nevnd Tinghellan. Onki er nýtt undir sólini, stendur skrivað. Í gomlum døgum var føroyska tingið hildið í Tinganesi, har tingfólk gingu innanfyri veðbondini, meðan tað vanliga fólkið stóð uttanfyri. Sjálvsagt høvdu tingfólk tá sum nú mest at siga, men bæði í krókum og skotum á Tinganesi og helst eisini á sjálvari Tinghelluni hava fólk við áhuga ella skili fyri ávísum viðurskiftum havt høvi at sagt sína hugsan.

Eitt lítið land má hava eina skipan seymaða til eitt lítið land. Fólkið ger av, hvør skal ráða, men tey ráðandi kunnu - og skulu - lurta eftir skili og sjónarmiðum, ikki bara ráða yvir høvdið á fólkinum.

Fólk við royndum, fólk við útbúgving, fólk við sjónarmiðum fáa nú eitt alment forum, har debattin, analysan, kjak og fatanir kunnu vera við at menna føroyska samfelagið. Alt hetta verður partur av nýggja Vikuskiftissosialinum eina ferð um vikuna.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Villleiðandi SvF

Johan Petersen

SvF hevur í hesum døgum endursent sendingarnar hjá Høgna Hoydal um bankamálið. Men SvF kann ikki bara sær at koma við villleiðingum

SvF hevur í vikuni í samband við, at tað hevur 20 ár á baki, í trý fylgjandi kvøld endursent sendingarnar hjá Høgna Hoydal og øðrum um bankamálið. Hóast nógv er hent í hesi 7-8 árini, síðani sendingarnar vóru gjørdar og okkara vitan um málið er væl størri í dag enn tá, so leggur SvF upp til, at sendingarnar verða endurmettar, grundað á vitan okkara í dag um málið.

Alt gott um tað, men táið Ivan Niclasen, sjónvarpsvertur, í lýsing sini av fyrstu sending sigur, at hetta mál kom at kosta føroyska skattgjaldaranum 2,7 mia. kr., tá villleiðir hann longu hyggjaran, sum - um hann ikki er betri vitandi - sjálvandi metir sendingarnar við grundstøðinum, sum SvF hevur lagt í hann.

Kostaði ikki skattgjaldaranum 2,7 mia, men 300 mió. í vinningi

Lýsing Ivans er beinleiðis ósannindi, tí í 1993 bleiv landskassin høvuðspartaeigari í Føroya Banka, sum 30. juni í ár hevði eina roknskaparliga eginogn upp á 1.543 mió kr. Harumframt fekk landskassin í 1998 endurgoldið 1.500 mió. kr. Sostatt hevur Landskassin fyri 2,7 mia. kr. fingið 3,0 mia kr. ella ein vinning upp á 300 mió kr.!

Ivani nýttist ikki at koma við nevndu lýsing, men tá ið hann ger tað, má minsta krav hyggjarans verða, at lýsingin er rætt og ikki tendensiøs!

Sendingarnar politiskt sikti

Skal ikki gera nakra meting av sjálvum sendingunum, tað vildi verið alt ov nógv at komið inn á, nú vit í baksýninum vita, at sendingarnar høvdu politiskt sikti, men bert biðja teir hyggjarar, sum veruliga vilja gera sær eina meting um bankamálið, eisini at skoyta til hina síðuna og lesa áhugaverdu bókina hjá Richard Mikkelsen Færøerne i bankkrisens tegn.

Tað vóru jú ikki danir, sum ynsktu at blanda seg, men føroyingar, sum hálvavegna brutu upp dyr á miðjari nátt í danska forsætismálaráðnum í okt. 1992 og bóðu um hjálp!!

Politiskt strongd barnaansing

Jógvan Arge
býráðslimur

Tað hevur mangan verið lítið gott at frætta av Vaglinum seinastu árini. Tórshavnar Kommuna hevur mistikið seg ella forlopið seg í einum máli fyri og øðrum eftir.

Hon hevur tí fingið høgg oman á høgg fyri sína handfaring av málum og borgarum.

Eitt hava vit tó verið samd um í býráðnum: at seta dik á at loysa tann stóra tørvin, sum hevur verið á ansingarplássum til børn.

Hetta hevur verið gjørt við at byggja barnagarðar og vøggustovur, sum er tað,ið fólk flest vilja hava.

Vit eru komin langt áleiðis við hesum byggingum, men vit eru ikki komin á mál og koma kanska ongantíð heilt á mál.

Kortini fór Tórshavnar Kommuna nú hendan dagin út við einum officiellum tíðindaskrivi um, at øll børn yvir hálvt ár hava fingið ansingartilboð. Hvørt skal siga: allur ansingartørvur er loystur.

Hóskvøldið fingu vit so at vita um eina av teimum metodum, sum liggja til grund fyri páhaldinum í kommunala tíðindaskrivinum.

Kommunan hevur potað fleiri børn, enn gott er inn á stovnarnar, sum eru tøkir í dag. Hesum hava stovnsleiðslurnar ampa av, bæði mótvegis børnum og starvsfólkum.

Havi sjálvur sitið í mentamálanevndini hetta skeiðið og havi ikki vitað betur, enn at politikkurin hjá Tórshavnar Kommuna hevur verið at hava barnaansing á hægsta trivnaðarliga stigi.

Veit onki um, at minkast skuldi um møguleikarnar hjá børnunum at trívast á stovnunum til tess at politiska samgongan upp undir tilstundandi kommunuvalið í ótíð kundi reypa av loystum ansingartørvi.

Men tað er eftir øllum at døma tað, sum nú hendir.

At fara við teimum smæstu og viðkvæmastu borgarunum næstan sum høsnum í búri fyri at fáa gloriuna at sýnast at skína til valið er at fara langt út um sømiligt mark.

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bleðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

240 milliónir í virðisvøkstri av okkara fiskatilfeingið fara óvirkað av landinum??

Johan Dahl,
løgtingsmaður
Vágur 10.09.2004

Taka vit flakavinnuna á landi, so skapti hendan í fjør ein virðirsvøkstur pr. kilo, av tí sum hon framleiddi uppá uml. 6,00 krónur.

Hyggja vit so eftir, hvussu nógvur fiskur bleiv seldur beinleiðis av landinum, so var nøgdin umleið 40.000 tons.

Vit eiga at spyrja okkum sjálvi - hava vit sum samfelag ráð til at lata slíka nøgd fara millum fingrarnar á okkum?

Hava vit ráð til at lata ein virðisvøkstur, sum eigur at skapa arbeiði her heima fyri ca. 240 milliónir ella kanska meira frá okkum? Kunnu vit verða hann fyriuttan?

Hyggja vit at Íslandi, so hava hesir púra greiðar reglar fyri, hvussu teir fáa sum mest burturúr teirra tilfeingi.

Fer fiskur óvirkarður av landinum har, so verður hesin álagdur avgjøld og harvið gera keyparar og framleiðarir alt fyri at virðisøkja fiskin, áðrenn hann verður útfluttur.

Teir skapa harvið eisini stabilitet í vinnuni og harvið samfelagnum.

Í Føroyum hava vit stórt sað ongi krøv ella lógir hesum viðvíkjandi

Eiga vit ikki at seta treytir við okkara rávørutilfeingi, soleiðis at tað skal verða selt yvir uppboðssølu í Føroyum, góðska og støddarskilt, har allir - føroyingar og útlendingar, kunnu bjóða á líka fóti?

Við ørðum orðum, vit krita banan upp - spæla á heimavølli og bjóða útiliðnum at spæla móti okkum her á líka fóti.

Kan sonn ein spyrja seg sjálvan _ hvat so við kappingini - verður hon ikki avlagað við at vit selja allan okkara fisk sum verður veiddur í føroyskum økið yvir føroyska uppboðssølu? Sjálvur meti eg ikki, at vit harvið koma at avlaga kappingina, men heldur hinvegin veruliga koma at hava fría kapping har allir bjóða her heima á líka føti, men vit seta dagskránna - tað sum kemur at skilja eigur alt annað líka ikki at vera annað enn flutningskostnaðurin til meginlandið.

Tey gjøld sum verða kravd herheima fyri kassaleigu, skiljing, pakking osfr. mugu so sjálvandi verða á einum kappingarførum støði.

Ein NON PROFIT (sum ikki gevur avlop) uppboðssøla sum t. d. fiskimenn, keyparar og seljarar eiga, eigur møguliga at verða stovnað at taka sær av allari søluni.

ES avtalan frá 2001

Vit mugu eisini hava í huga, at vit hava undirskrivað ein veterinæravtalu við ES í 2001, har vit hava bundið okkum til, at allur fiskur skal lýsast til sølu, góðskumettur og støddarskildur.

Kemur bara ein klaga til ES um, at vit ikki halda okkum til undirskrivaðar avtalur á hesum øki, so kunnu vit vænta at fáa ein yvir nakkan, sum so kann verða til óbótaligan skaða fyri okkum sum framleiðaraland til hendan marknað.

Framtíðar keyp og søla má endurskoðast

Hetta evnið - keyp, søla og framleiðsla av fiski í Føroyum av føroyska landgrunninum, hevur alstóran samfelagsligan týdning og eiga vit sum politikkarar at hava rygg til at taka hesi málini upp til viðgerðar straks og fremja neyðugar tillaginar í skipanini, tí við verandi gongd so fer virksemið hjá flakavinnuni á landi áhaldandi at minka, og tað kann ongin av okkum livað við.

Skipanin er ikki nøktandi sum er.

• Vit mugu viðgera plussir og minussir við skipanini í verandi líki.

• Vit eiga at viðgera spurningum um úrslitið av gongdini ikki kemur at føra við sær eina vertikala integratión, har skip og virkir aftur verða tengd at hvørjum ørðum og hvør (hvørji økir í landinum) um so verður kemur at verða við sviðið so.

• Vit eiga at hyggja at hvussu vit fáa tillaga eina nýggja skipan fyri keyp og sølu av fiski í Føroyum

• Hvør skal t.d. verða seljarin, um fiskurin verður fluttur óvirkaður av landinum - skal tað verða loyvishavarin ella annar seljari?

• Vit eiga at gera eina tillagingartíð fyri at fáa møguligu broytingarnar at virka sum tær skulu .

• Vit eiga at gera karmar soleiðis, at vinnan hevur stabilitet og verður at líta á hjá teimum sum keypa.

• Tað eiga at verða gjørdar reglar fyri, hvussu eisini arðir skipabólkar kunnu gagna samfelagnum í mest møguligan mun, t. d hvussu hjáveiðan hjá uppisjóarflotanum eigur at koma til høldar

• Hvussu fáa vit best møguligt virðisøkt og gagnnýtt t. d. svartkjaftin framyvir, - fóður til laks og síl? Surimi?Fars? heilfryst?

Nevnd kundu verið fleiri ting, men eg meti, at tað er neyðugt at fáa debatt um hetta evnið og hareftir framt neyðugar broytingar skjótast møguligt, tí tað eru kanska enn størri upphæddir enn tær 240 milliónirnar, sum fara millum fingrarnar á okkum, uttan at vit geva okkum nóg nógv far um tað.

Floks- og løgtingsdissiplin

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Tingmaðurin Tórbjørn Jacobsen hevði nøkur formanandi orð í Dimmalætting hósdagin, um floksdissiplin og skipað tingarbeiði.

Tað er vanligt, at tann sum vegleiðir onnur, roynir at vera fyrimynd sjálvur. Tí mugu vit ganga út frá, at Tórbjørn Jacobsen hevur ta fatan, at hann sjálvur vandar sær væl um ordini á tingsins røðarapalli, at hann virðir formansskapin, yvirheldur ásettu talutíðirnar, og at hann ikki svarar til úr tingsalinum, tá onnur hava orðið. Eisini mugu vit ganga út frá, at maðurin hevur floksdissiplin, og at hann ikki setur fyrispurningar á tingi, sum einans hava til endamáls at darva tingarbeiðinum.

Men tað kennist løgi, tá Tórbjørn Jacobsen sigur, at Tjóðveldisflokkurin er einasti flokkur á Løgtingi, sum hevur skipað seg við framsøgufólkum, meðan aðrir tingmenn "fara upp at gáka", hvørja ferð eitt mál skal viðgerast.

Sambandsflokkurin gongur fult inn fyri dissiplini og virðing, bæði innanflokka og í tingsalinum, og flokkurin hevur sjálvsagt framsøgufólk, hvørt á sínum øki.

At Tjóðveldisflokkurin haraftur mótí tykist at síggja tað sum sína fremstu uppgávu í andstøðu, at darva politiska arbeiðinum mest møguligt, vísir tann vantandi virðingin, sum flokkurin hevur víst tinginum síðani valið. Bara síðani á ólavsøku hava landsstýrismenn á tingfundum svara 21 munnligum fyrispurningum frá Tjóðveldisflokkinum, og harumframt liggja triggir skrivligir fyrispurningar frá sama flokki og bíða eftir at verða svaraðir.

Spurningarnir eru ikki bara nógvir í tali, men teir eru eisini sera umfatandi. Dømi er um, at ein fyrispurningur frá Tórbjørn Jacobsen var í 10 punktum, so landsstýrismaðurin sum hevði tveir minuttir at svara í, kundi í mesta lagi brúka 12 sekund til hvønn spurning.

Spurt verður um bæði líkt og ólíkt, og tá spurningarnir eru svaraðir, sigur spyrjarin so at siga hvørja ferð, at hann er ikki nøgdur við svarið, men tað heldur honum kortini ikki aftur við at seta enn fleiri spurningar av sama slag.

Sjálvsagt er tað í lagi, at tingmenn seta landsstýrismonnunum fyrispurningar. Men tað er ikki í lagi, tá endamálið einans er at vera meinbogi hjá teimum, sum vilja nakað í politikki.

Gamalt er, at tann sum býr í glashúsi, eigur ikki at kasta við grótti. Tí eiga Tórbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkurin ikki at úttala seg við alt ov stórum orðum, tá tosað verður um manglandi virðing í ørðum flokkum. Teir byggja nevniliga einki land við tí framferð, sum teir hava víst á tingi hetta seinasta hálva árið.

Sambandsfloksins áheitan á Tjóðveldisflokkin skal tí vera, at vit øll samstarva um at lyfta støðið, virðingina og dissiplinið, bæði á tingi og í flokkunum.

Samstarv er vegurin fram.

Granskarin Beinta í Jákupsstovu og útlendingar í Føroyum

Føroyingar halda seg framvegis vera vanliga gestablíðir, og vit meta framvegis útlendingar sum gott tilfeingi

Jógvan við Keldu, landsstýrismamaður

Havi verið ivasamur um eg skuldi gera viðmerkingar til orðini hjá Beintu í Jákupsstovu, granskara í Útvarpi Føroya fyri viku síðani í samband við viðger av útlendinga-málum í Føroyum. – Tað verður tó gjørt, tí hennara útsagnir eiga ikki at standa einsamallar.

Tá granskari og søgufrøðingur tosar ella skrivar, hevur tað sjálvandi tyngd. Hesi vita væl meiri enn flestu av okkum um tað, tey hava við at gera. - Søgufalsan ella rangar viðmerkingar frá einum granskara verða tí tikin í álvara.

Hon nevndi m.a. hetta einfalda í at vit áttu at bjóða útlendingum vælkomnar til landið og læra tey málið. - Ja, hvør tekur ikki undir við tí.

71 ymiskar tjóðir í Føroyum

Men fyrst av øllum átti hon at gjørt sær greitt, hvat hetta inniber. Vit hava ikki færri enn 71 ymiskar tjóðir umframt norðurlendingar í landinum og harvið nógv ymisk tungumál, har lærarar og frálærumøguleikar skuldu til. - Hon eigur at kenna tað ofta illa sperda skúlaverkið.

Ofta kann vera meining í at gera eitt og annað í londum har milliónir búgva, men er burturvið at royna at fremja í smátjóð, bara tí at tølini eru ov smá.

Lógir og treytir

Síðani nevndi hon, at hesi eru skattborgarar í Føroyum.

Tað er rætt, um so er, at tey hava arbeiði. Tí stendur týðiliga í donsku útlendingaógini, tá loyvi verða givin hjá útlendingi at flyta til Føroya, at treytin er "væsentlige beskæftigelseslsmæssige eller erhvervsmæssige hensyn taler for at imødekomme ansøgningen". – Í løtuni hava vit uppgangandi arbeiðsloysi, sum fer heilt upp í 20% í onkrum økjum í Føroym.

Tá hon - á sín uppalandi hátt - sigur, at "fyrr í tíðini var útlendingurin eitt tilfeingi", er hon ikki í iva, at so er ikki longur, tí víðari sigur hon, at "tað er ósømuligur atburður at blaka útlendingar av landinum".

Her eigur krav at vera, at hon - við tí status hon hevur - kemur við nærri og vælundir-bygdari frágreiðing í viðastu merking.

Viðvíkjandi íslendsku kvinnuni, hon nevnir í Hovi, sum bert hevði vælrætt og ikki vælbari til kommunuval er at siga, at hesin skeivleiki er millum tær lógarbroyt-ingarnar, sum eg ætli at leggja fyri løtingið væntandi í komandi viku.. - Hetta var beinleiðis sera óheppin skeivleiki í vallógini til føroyskar kommunur.

Útlendingar skulu kenna seg væl

Lat meg í fyrstu syftu enda her og gera vart við, at vit føroyingar halda okkum framvegis vera vanliga gestablíðir, vit ynskja, at tey ið koma til okkara, skulu kenna seg væl. Vit meta framvegis at útlendingar eru gott og týðandi tilfeingi og góðir skattaborgarar, tá arbeiði er til tey.

Við hesum í huga, og við royndunum sum gjørdar eru í londunum uttan um okkum, er avgjørt, at vit skulu úrgreina og lýsa hetta øki væl, soleiðis at vit í framtíðini fáa eina góða og vælvirkandi útlendingalóg, sum bæði tænir landi okkara og ikki minst, at teir útlendingar sum koma her, kenna seg væl og gerast góðir samfelagsborgarar.

Nei, hetta er ikki eitt so einfalt mál, at hetta bara kann tosast um í einar tveir triggjar minuttir í einum útvarpspráti, sjálvt um prátið er við granskara - sum annars ikki nevndi, nær hon hevur granskað í viðurskiftum hjá útlendingum í Føroyum.